# Knappa hálva millión fyri at lesa frágreiðing

*Nú frætta vit, at løgmaður ætlar at brúka kr. 400.000 til at lata ein løgfrøðing lesa frágreiðingina hjá einum øðrum – alment løntum – løgfrøðingi. Um løgmaður ikki kann brúka løgdeildina, hví skulu so onnur hava álit á henni, vil Annita á Fríðriksmørk hava at vita frá løgmanni*

ÓLAVUR Í BEITI

Annitu á Fríðriksmørk, løgtingsmaður, hevur sett løgmanni seks spurningar í fyrispurningi. Fyrst vil hon hava at vita, hvussu nógvir løgfrøðingar og búskaparfrøðingar eru í aðalstýrunum? Hvussu nógvar pengar kostar tað almennum stovnum at brúka eksternar løg- og búskaparfrøðingar? Hvat heldur løgmaður vera fyrimunir og vansar við eini miðsavnan av serfrøðini? Og at enda vil Annita á Fríðriksmørk hava at vita um løgmaður fer at taka stig til at leggja løgfrøðiligar uppgávur saman á eina løgdeild, og búskaparligar uppgávur saman undir Fíggjarmálastýrið?

**3-5 til hvørt aðalstýri**

Í viðmerkingunum verður greitt frá, at tað eru nú átta aðalstýri, sum hvør í sínum lagi hava nakrar løgfrøðingar, nakrar búskaparfrøðingar eins og hópin av øðrum fakbólkum. Fyri løgfrøðingarnar og búskaparfrøðingarnar er tað galdandi, at teir hava hvør sítt stýrið, sum er serliga ætlað teirra fakbólki. Løgdeildin fyri løgfrøðingar. Fíggjarmálastýrið við sínum deildum fyri búskaparfrøðingar.

– Serliga tykjast løgfrøðingarnir at vera í stórum tali innan fyrisitingina. Einir 3-5 eru undir hvørjum aðalstýrið, umframt at stýrini og tilhoyrandi stovnar brúka bæði internar og eksternar løgfrøðingar afturat teimum føstu í aðalstýrunum, sigur Annita á Fríðriksmørk.

– Tó eru bert nakrir heilt fáir á løgdeildini. Hetta merkir í dag eitt ófulfíggjað juridiskt arbeiði bæði í stýrunum og á sjálvari løgdeildini, og kemst hetta av, at einki veruligt umhvørvi verður uppbygt. Tað tykist, sum hvørki uppgávur ella persónar eru sett á rætt stað, men eru miðspjadd út á øll aðalstýrini. Løgdeildin fær vanliga nakrar fáar dagar, har valla er nóg mikið av tíð til annað enn at rætta nakrar stavivillur.

**Hægsta boð**

– Nú frætta vit, at løgmaður ætlar at brúka kr. 400.000 til at lata ein løgfrøðing lesa frágreiðingina hjá einum øðrum – alment løntum – løgfrøðingi. Um løgmaður ikki kann brúka løgdeildina, hví skulu so onnur hava álit á henni? Fyri 400.000 kr. fekk løgmaður hægst lønta løgfrøðing eftir BLF sáttmálanum. Hesin kundi so brúkt bæði tvær og triggjar vikur til frágreiðingina og so røkt veruliga neyðugar uppgávur restina av árinum.

– Tað er einki løgið at síggja byrjunartrupulleikar við eini nýggjari landsumsitingarskipan. Men hinvegin kann tað tykjast løgið, um vit lata verandi kós koyra, hóast hon ikki er lagað til føroysk viðurskifti, og hóast vit síggja, at her er okkurt, sum kundi verið betur. Hetta gerst als ikki eftir einum degi. Men spurningurin er, um vit vilja seta kósina móti eini miðsavnan av serfrøðini ella um vit góðtaka, at hon er spjødd út átta ymisk aðalstýri, sigur Annita á Fríðriksmørk m.a. í viðmerkingunum.



# Moralska skyldan røkkur ikki nóg langt

*Okkara fremsta mál má vera at geva øllum borgarum somu møguleikar. Stórur munur er eisini á, hvussu ymisk brekað verða viðfarin, sigur Katrin Dahl Jakobsen m.a. í viðmerkingunum til fyrispurningin um íbúðir til brekað*

ÓLAVUR Í BEITI

Katrin Dahl Jakobsen, løgtingslimur Javnaðarflokksins, hevur spurt Helenu Dam á Neystabø, almanna- og heilsumálaráðharra, um hon hevur sett sær nøkur mál viðvíkjandi íbúðarmøguleikum hjá brekaðum, sum hon vil náa, tað, ið eftir er av valskeiðinum? Um so er, at ein ítøkilig og munagóð ætlan er á veg, hvussu kundi hon hugsandi sæð út? At enda spyr katrin Dahl Jakobsen, um landsstýrismaðurin heldur at ábyrgdin fyri hesum samfelagsbólki er nóg væl tryggjað, tá ið tað ræður um rættindi á sosiala og bústaðarliga økinum?



Í viðmerkingunum greiður spyrjarin frá, at tíðliga á heysti 1998 fór ein arbeiðsbólkur undir at greina út bústaðarviðurskiftini hjá brekaðum í Føroyum. Við í arbeiðsbólkinum vóru umboð fyri Tórshavnar Kommunu, Klaksvíkar Kommunu, Føroya Pedagogfelag, Serstovnadeildina, Meginfelag teirra brekaðu og Javna.

**17 bútilboð**

– Álit varð greitt úr hondum 10. apríl 2000. Við hesum hava vit fingið lýst støðuna, sum hon er í dag, somuleiðis sum hugleitt verður um, hvussu farast kann fram at bøta um viðurskiftini hjá teimum, sum hóast tak yvir høvdið, í veruleikanum mugu sigast at vera heimleys.

– Ein av niðurstøðunum í álitinum sigur, at ábendingar eru um, at neyðugt er at fáa til vega minst 17 bútilboð beinanvegin og eini 80 tey komandi 10 árini. Umframt hesi 17, sum Javni vísir á, eru 25 á Psykiatrisku deild, sum eisini áttu at komið undir bráðfeingistørv, umframt tey, sum ganga fyri vág og vind. Á deildini fyri tey dementu eru 10, sum heldur áttu at verið á hóskandi røktarheimi, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

**Skáka sær undan**

– Tað er einki yvir at dylja, at her er talan um ein samfelagsbólk, sum ikki fær tær sømdir, sum øll onnur taka fyri givið, eftirsum flestu okkara sjálvi eru før fyri at syrgja fyri tí. Okkara fremsta mál má vera at geva øllum borgarum somu møguleikar. Stórur munur er eisini á, hvussu ymisk brekað verða viðfarin. Tey hepnu fáa so dánt sín tørv nøktaðan og onnur als ikki.

– Er tað so, at skiftandi landsstýrismenn skáka sær undan ábyrgd viðvíkjandi rættinum hjá hesum bólkinum til hóskandi bústað, arbeiði, uppvenjing ella viðgerð, er neyðugt, at hesin rættur verður staðfestur við lóg. Forsorgarlógin gevur myndugleikunum møguleikar, tá tað snýr seg um bústaðir, men staðfestir helst ikki ábyrgd og skyldu í nóg stóran mun, havi eg skilt hana rætt. Syrgiliga støðan, ber helst boð um, at moralska skyldan røkkur ikki nóg langt, sigur Katrin Dahl Jakobsen at enda í viðmerkingunum.

# Sethúsaprísurin í eina náttúrliga legu

*Tað er eingin loyna, at sethúsaprísirnir í Havn eru methøgir í løtuni, og tað er einki, sum týðir uppá, at teir fara at lækka í nærmastu framtíð, sigur Jákup Sverri Kass*

ÓLAVUR Í BEITI

Metir landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, at neyðugt er at seta tiltøk í verk til tess at taka hæddina av prísinum á sethúsum o.ø. møguligum árinum, sum koma í sambandi við eina komandi oljuvinnu í Føroyum? spyr Jákup Sverri Kass í fyrispurningi til Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra.

Í viðmerkingunum, sigur Jákup Sverri Kass, at tað er eingin loyna, at sethúsaprísirnir í Havn eru methøgir í løtuni, og tað er einki, sum týðir uppá, at teir fara at lækka í nærmastu tíðini. Og um ein møgulig óljuvinna kemur at vinna sær fótafesti her á klettunum, so fara virðini á teimum føstu ognunum at vaksa enn meira.

**Meinigi maðurin tryggjast**

– Vit eru noydd at tryggja okkum, at tann meinigi



maðurin framhaldandi fer at hava møguleika at festa sær búgv uttan at seta seg í lívlanga skuld.

– Politisku myndugleikarnir eiga og skulu tryggja, at píslegan á sethúsum ikki fer at vaksa ovurhonds og ger at bara óljufeløgini og ríkmaðurin koma at hava møguleikan at byggja og keypa hús og harvið taka møguleikan frá føroyingum, sum ynskja at búgva í økjum, har oljuvinnan fer at hava týdning.

Og Jákup Sverri Kass vónar so sanniliga, at landstýrið tekur hendan spurningin í stórum álvara og fer at arbeiða við at tryggja, at sethúsaprísurin og prísurin á grundstykkjum koma í eina náttúrliga legu, sigur hann í viðmerkingunum.





*Týsdagin klokkan hálvgum tvey seinnapartin setti Finnbogi Ísakson, tingformaður, fyrsta tingfundin uttan fyri tingsalin í 300 ár*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Nógv betur enn tinghúsið

*Flestu tingfólk vóru samd um, at tey aldri áður høvdu havt so góðar umstøður, sum tá fyrsti tingfundurin í útvarpshøllini varð hildin týsdagin*

JOHN JOHANNESSEN

Útvapshøllin er væl betur egnað til tingsal enn tingsalurin í tinghúsinum.

Hetta heldur løgtingsformaðurin, Finnbogi Ísakson, og tað sama halda tey flestu av tingfólkunum.

– Higani fara vit ikki út aftur, segði okkurt av tingfólkunum í spølni úti á ganginum, tá fyrsti tingfundurin í útvarpshøllini varð hildin týsdagin.

**Nógv rúmsáttari**

Ein av fyrimununum við at brúka útvarpshøllina til tingsal heldur tingformaðurin vera, at hon er nógv rúmsáttari enn tingsalurin.

– Tað er gott pláss hjá tingfólkunum at sita í útvarpshøllini, og av tí at plássið er so gott, verður heldur ikki so ring luft í útvarpshøllini, sum í tingsalinum, sigur Finnbogi Ísakson.

Eisini viðurskiftini uttan um útvarpshøllina heldur tingformaðurin vera ógvuliga góð. Hann vísir á, at gott pláss er hjá tingfólkum úti á gangunum, somuleiðis sum tingið eisini hevur fingið væl egnaða kaffistovu og fundarhøli, til taks frá útvarpinum.

Harafturat fegnast tingformaðurin um, at eingin gjóstur er í útvarpshøllini eins og í tingsalinum, tá vesturættin liggur trá.

– Viðurskiftini at halda tingfund í útvarpshøllini eru yvirhøvur nógv betur, sigur Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður.

**Roksut at atkvøða**

Av tí, at løgtingið bert fyribils skal halda til í útvarpshøllini, er elektróniska atkvøðuskipanin ikki flutt úr tingsalinum niðan í útvarpshøllina.

Tí mugu tingmenn reisa seg fyri at gera vart við, um teir eru fyri, ímóti ella atkvøða blankt fyri einum uppskoti.

– Hetta ger atkvøðugreiðsluna meira roksuta, ger Finnbogi Ísakson vart við.

Meðan tingfólk í tingsalinum við at trýsta á ein knøtt kunnu gera greitt, um tey eru fyri, ímóti ella atkvøða blankt fyri einum uppskoti, mugu tingfólk í útvarpshøllini reisa seg tríggjar ferðir, áðrenn hetta er greitt.

Tingformaðurin má spyrja tingfólkini um tey eru fyri uppskotinum, og síðani skulu tey, sum eru fyri, reisa seg. Tað sama er galdandi fyri tey, sum atkvøða blankt ella ímóti.

**Fíggjarlógin fyri í útvarpinum**

Arbeiðið at byggja um tinghúsið gongur sum ætlað, og skal tað vera liðugt um mánaðarskiftið.

Men tað er ikki vist, at húsið verður heilt klárt áðrenn fíggjarlógaruppskotið skal viðgerast.

Tí er møguleiki fyri, at fíggjarlógin fyri ár 2001 verður viðgjørd í útvarpshøllini og tískil verður ein søgulig fíggjarlóg.

Tingfundurin týsdagin var eisini ein søguligur tingfundur. Hetta var fyrsta ferðin í 300 ár, at tingfundur varð hildin uttan fyri tingsalin.

# Øll fáa pláss um trý ár

*Sosiala nevnd hjá Tórshavnar Býráð samtykti týskvøldið eitt uppskot frá Elin Lindenskov um, at øll skulu hava møguleika at fáa barnagarðspláss innan 2003*

JOHN JOHANNESSEN

Innan trý ár skulu øll børn í aldrinum millum hálvt og átta ár í Tórshavnar Kommunu hava tilboð um mennandi barnagarðs- og frítíðarvirksemi.

Soleiðis ljóðar partur av einum uppskoti frá Elin Lindenskov, býráðslimi, sum varð samtykt á fundi í Sosialu nevnd hjá Tórshavnar býráð týskvøldið.

Í løtuni standa 365 børn á bíðilistanum til at fáa ansingarpláss í Tórshavnar Kommunu, og væntandi er, at tørvurin orsakað av tilflyting fer at gerast alsamt størri.

Men Sosiala nevnd hevur sett sær fyri, at longu bíðilistarnir skulu gerast søga. Ein samd nevnd fer at leggja uppskotið fyri býráðsfundin, sum verður 5. oktober. Og formaðurin í Sosialu nevnd væntar, at uppskotið fer at verða samtykt.

Til uppskotið hevur Elin Lindenskov gjørt eina nágreiniliga ætlan fyri, hvussu tørvurin kann nøktast á forsvarligan hátt.

